


# LANDSFUNDUR 2016

Føroya Fiskimannafelag

**Góðu fiskimenn**

Árið 2016 er um at vera runnið. Hetta hevur verið enn eitt ár við avbjóðingum av ymsum slag. Fakfelagsliga sjálvandi, men millum fólk, ikki minst fiskimenn, man kjakið mest hava snúð seg um, hvussu fiskivinnan fer at verða skipað í framtíðini.

**Fiskivinnunýskipan**
Tað hevur verið kjakast nógv um eina nýggja Fiskivinnunýskipan í nógv ár nú. Politiska toganin er væl og virðiliga farin í gongd, og tað, sum man hava órógvað manga familju, ið hevur sítt livibreyð á sjónum, hetta seinasta árið, man vera alt róparíið um uppboðssølu.

Ein familja, ið hevur bygt alla sína framtíð á, at tey skulu lívbjarga sær við tí, sum havið letur teimum, hevur sera ilt við at síggja tað skilagóða í, at henda framtíðin nú skal bjóðast út á eini uppboðssølu.
Tey hava ilt við at skilja, at teirra lívsgrundarlag skal gerast so ótrygt og tilvildarligt, meðan onnur í samfelagnum fáa síni viðurskifti tryggað við lóg. Hetta vekir sjálvandi mikið harmaljóð millum fiskimenn og teirra familjur.

**Sáttmálagrundarlagið hvørvur**
Onki er at ivast í, at við eini fiskivinnunýskipan verður grundarlagið undir verandi sáttmálum fullkomiliga broytt – um talan altso verður um so kollveltandi broytingar, sum tað er lagt upp til.

Tað fer allarhelst at merkja, at partarnir, bæði manningarfeløg og reiðarar, verða í sínum góða rætti at siga sáttmálarnar upp 1. januar 2018.

Tí er tað ógvuliga umráðandi, at verandi sáttmálabygnaður verður endurskoðaður og dagførdur, soleiðis at vit eru til reiðar til eina slíka støðu.

Tað var eisini ein partur av seinastu sáttmálasemju, at partarnir beinanvegin skuldu vara undir hetta dagføringararbeiði, men tað er tíverri ikki hent. Eg skal ikki geva nøkrum skyldina fyri, at tað ikki er hent, tað hava partarnir verið líka góðir um. Størri og smærri mál í gerandisdegnum hava tað við at fara við allari orkuni – eisini henni, ið átti at verið brúkt upp tær meira langsiktaðu linjurnar.

Men uppgávan er átrokandi at fáa loyst, tí um eitt ár og níggju dagar hava vit 1. januar 2018.

**Noregsferð**

Sjálvt um felags dagføringararbeiðið ikki er farið í gongd, hevur Fiskimannafelagið tó ikki ligið á tí lætu síðuni hesum viðvíkjandi.

Sum ein liður í fyrireikingunum til eina fiskivinnunýskipan og eina harvið broytta sáttmálastøðu, vóru vit í vár í Norra og kannaðu fiskivinnubygnað, sáttmálaviðurskifti og tryggingarviðurskifti har.

Orsøkin til, at vit gjørdu hesa námsferð til júst Norra, er, at serliga reiðararnir ofta vísa til viðurskiftini í Norra, tá vit samráðast. Og frá reiðarunum hava vit hoyrt nógv uppáhald um, hvussu tað er í Norra, og at soleiðis mugu vit eisini gera.

Ein tann mest lívsseiga mýtan er, at í Norra hava tey vælvirkandi fastlønarskipanir í fiskivinnuni. Skipanir, har menn fáa eina fasta løn, sum ikki er neyvt bundin at fiskiskapi og prísi annað enn kanska við einari bonusskipan.

Eg haldi, at eg kann tosa fyri teir flestu í nevndini, tá eg sigi, at vit eisini trúðu, at fastlønarskipanir vóru bulurin í norsku sáttmálunum.

Men vit  sannaðu skjótt, at hetta er ein stór mýta. Bulurin í norsku sáttmálunum er býtisprosent, og tað eydnaðist okkum ikki at finna fram til nakað dømi um fastlønarskipan. Jú, føst úgjøld, sum vit kenna tað í okkara egna uppsjóvarflota, men 100 prosent grundað á sáttmálasett býtisprosent.

Norsku sáttmálarnir eru eisini gjøgnumgangandi betri enn teir føroysku. Teir brúka eina sonevnda lot-skipan, har hvør maður hevur sítt býtisprosent – sín lot – í staðin fyri sum í Føroyum, har býtisprosentið er fyri alla manningina til javnbýtis.

Men rokna vit norska modellið um til føroysk viðurskifti, so tølini kunnu samanberast, tá eru teirra hýruprosent av avreiðingarvirðinum hægri enn hjá okkum.

Taka vit til dømis uppsjóvarvinnuna, so liggur norska býtisprosentið umroknað til føroysk viðurskifti millum 20 og 22 prosent. Hjá okkum er tað 17,5. Men afturfyri eru eykapartarnir í Norra verri enn so so ógvusligir sum í Føroyum.

Norsku tryggingarnar eru eisini væl betri enn okkara, soleiðis at fiskimenn har í nógv størri mun eru tryggjaðir fyri veruligan inntøkumiss, og ikki sum her, har ein fiskimaður, sum kemur so illa fyri, at hann noyðist í land, bara fær ein prosentpart av einari arbeiðaraløn í sjúkratrygd.

Grundleggjandi er tað stórur munur á, hvussu politisku myndugleikarnir í ávikavist Norra og Føroyum hava skipa fiskivinnuna. Okkara fatan er, at norsku

myndugleikarnir legg størri dent á at gera tað liviligt hjá teimum, ið arbeiða í fiskivinnuni, enn teir føroysku.

Serliga viðvíkjandi vanlukku- og sjúkutrygging sker tað í eyguni her heima, at meðan øll á landi eru tryggjað, so tað tey fáa er proporsjonalt við mistu inntøkuna, so er hetta als ikki galdandi fyri fiskimenninar.

Hetta ber ikki til í longdini, og mugu stig takast til, at betra um støðu fiskimanna í so máta.

Tað kostar sjálvandi, tá øll nevndin og umsitingin í Fiskimannafelagum fer ein sovorðnan túr, men eg haldi, at Norra-ferðin var ein sera góð og neyðug íløga. Vit fingu eina rúgvu burtur úr og fingu eisini væl og virðiliga avsannað tey nógvu uppáhaldini frá føroyskum reiðarum um, hvussu tey gera í Norra.

Vit eru nógv betur fyri nú at fara undir dagføringina av sáttmálunum.

Annars verður støðan 1. hjanuar 2018 og dagføringin av sáttmálunum eisini millum evnini hjá gestarøðaranum Herálvi Joensen seinnapartin.

**Javnstøða í eftirløn**

Tað hevur verið tosað nógv um eftirløn, og eisini hevur verið tosað um, at konur eru við skerdan lut í eftirlønarspurningunum. Tá hevur tað einans verið tosa um tey, ið tað almenna Føroyar hevur gingið við til at lata eftirløn til.

Tað hevur hinvegin ikki verið tikið uppá tungu, at ein stórur partur av føroyingum hevur lítla ella onga eftirløn. Hvar er javnstøðan í eftirlønarspurningunum? Um almennu Føroyar høvdu rinda alla eftirløn inn í Samhaldsfasta Eftirlønargrunnin, høvdu tey, ið fóru á eftirløn, spart á leið 14 prosent, sum er farið til umsiting hjá pensjónsgrunnunum hesi árini. Hesir pengarnir høvdu í staðin kunna farið til at betri ellisár hjá øllum.

Tað verður ofta víst til, at eftirlønin er ein partur av arbeiðsmarknaðinum, men hesum eri eg als ikki samdur í. Tað er ein almenn uppgáva, at syrgja fyri, at allir borgarar á landi hava somu kor á ellisárum, altso somu eftirløn. Eg haldi, at tey av okkara fólkavaldu, sum ikki kenna tað soleiðis, als onki hava at gera á tingi. Tá ber heldur ikki til, at tosa um samhaldsfesti.

**Trygdin á sjónum**

Tað verið nakað av rumbli um trygdina á sjónum í ár. Tað var eftir, at mentamálaráðharrin seinasta vetur boðaði frá, at trygdarskeið fyri fiskimenn skuldi leingjast munandi. Vit vístu á, at hetta kundi fáa álvarsligar avleiðingar fyri møguleikarnar at seta nýtt fólk við. Tað fór at koma okkum aftur um

brekku, tí ungt fólk fór at halda seg aftur, so vit fóru ikki at kunna manna skip okkara.

Tí løgdu vit trýst á Mentamálaráðið fyri at finna eina loysn, sum var at liva við, og sum samstundis var í samsvar við altjóða lóggávu.

Í summar kom so eitt uppskot, sum var til at hava við at gera, og eiga tey aftan fyri stað tóra tøkk fyri at gera sær ómak.

Hetta skal ikki skiljast soleiðis, at Fiskimannafelagið ikki heldur, at meira eigur at verða gjørt fyri at okkara fiskimenn og –kvinnur læra meira og verða meira tilvitað um trygd.

Tvørturímóti vilja vit leggja orku í at fáa hækka trygdarstøði. Ein ráðstevna um trygd í sambandi við Sjómannadagarnar í august vísti eisini týðuliga, at arbeiðstrygdin umborð á okkara fiskiskipum er alt ov vánalig. Har henda alt ov nógvar vanlukkur. Eg skal tríva aftur í ta ráðstevnuna um eitt bil.

Men Fiskimannafelagið dámdi ikki, at fiskimenn knappliga skuldu á skeið í 3 vikur í staðin fyri 2-3 dagar, tí vit hildu ikki, at tað fór at gera nakran mun. Politiska avgerðin var jú ikki tikin, tí man knappliga helt, at trygdin skuldi betrast, men bert tí, at hetta var partur av altjóða regluverki.

Um vit vistu, at eitt longt skeið tók støði í veruleikanum í okkara fiskivinnu – í teimum konkretu vandamálum, sum har eru – so er als ikki vist, at vit høvdu sett okkum upp ímóti tí. Væl at merkja, um lagaligar freistir fyri avloysarar eisini varð flættað inn í, so nýggja skipanin ikki steðgaði allari rekrutteringini til flotan.

Men vit sóu onki í kunngjørda 3 viku skeiðnum, sum segði okkum, at tað fór at betra um trygdina. Tað tók ikki støði í nøkrum øðrum enn einum ynski hjá Mentmálaráðnum um, at okkara trygdarskeið skuldu vera líka sum tey donsku.

Tey einastu, ið høvdu fingið veruligan vinning burtur úr skeiðnum, vóru teir báðir aktørarnir, sum skipa fyri skeiðunum.

Fiskimenn, sum vita akkurát, hvat tað vil siga at arbeiða á sjónum, mugu vera við til at gera arbeiðið, tá nýggj trygdarátøk og broytt trygdarkrøv verða sjósett. Annars munar tað onki, um so skeiðini eru 3 vikur, 3 mánaðir ella enn longri.

**Vandamikla lívið sum fiskimaður**

Vit hava vit tað leingi. Tað er hart og vandamikið, at arbeiða á sjónum. Tað eru eisini onnur enn fiskimenn, ið hava fingið eyguni upp fyri hesum. Millum annað tryggingarfeløg, sum taka risastórar peningaupphæddir fyri at tryggja fiskimenn við tí grundgeving, at tað er so vandamikið at hava sítt starv á sjónum. Tí kostar

ein trygging fyri ein fiskimann nógvar ferðir meira enn fyri ein í starv á eini skrivstovu.

Á ráðstevnuni um trygd á sjónum á Sjómannadøgunum legði Annbjørg á Høvdanum, sálarfrøðingur, fram kanning um vanlukku- og óhappstíttleikan umborð á føroyskum skipum.

Kanningin vísti lutfalsliga nógv fleiri vanlukkur henda umborð á okkara fiskiskipum enn á arbeiðsplássum á landi. Tað er serliga á dekkinum, at menn koma til skaða. Og tað eru fyri tað mesta dekkarar, sum doyggja í skipsvanlukkum ella fáa mein fyri lívið.

Kanningin vísir eisini, at føroyskir fiskimenn generlet hava ein munandi lægri livialdur enn fólk á landi.

Pál Wheie, professari í fólkaheilsu, greiddi eisini frá á ráðstevnuni um tey skaðuligu árinini, sum arbeiði á skipsdekki ofta hava á heilsuna. Fari eg ikki heilt skeivur, so haldi eg, at Pál Wheie segði nakað soleiðis, at um somu arbeiðsumstøður vóru á landi, so ivaðist hann í, um arbeiðsplássið hevði fingið loyvi at verið virkið.

**Lítil tímaløn**

Undantikið onkran part av fiskiflotanum, har tað nú gongur stak væl, er tað enn sum áður ein sannroynd, at fiskimenn so langt frá kunnu sigast at vera væl løntir í mun til ta longu arbeiðstíð, teir hava. Tímalønin er so onki at reypa av. Tí er tað ikki rætt, tá tað verður sagt, at allir fiskimenn forvinna stórar upphæddir. Her hevði tað verið upp á sítt pláss, at ein kanning varð gjørd, har arbeiði á sjónum varð samanborið við tað uppi á landi.

Eg ivist so ikki í, at um fiskimenn fingu tímaløn, so hevði tað sæð munandi betur út hjá teimum flestu.

Ein søga er um mann, ið var biðin við skipið norðuri í Klaksvík fyri nógvum árum síðan. Hann lovaði at umhugsa støðuna og venda aftur til reiðarin ella skiparan við boðum. Eftir at hava hugsað seg um, játtaði hann at koma við, um hann fekk tímaløn. Men tað hevði reiðarin ikki ráð til. Soleiðis er støðan enn fyri tað mesta í okkara fiskiflota. Vit megna ikki eina nøktandi løn til fiskimenn.

Hetta er tíverri serliga støðan í tí mest sperda partinum av flotanum, har sannlíkindini at fáa lyft hýrurnar, so tað veruliga munar, eru ringast.

Støðan blívur ikki betur av, at nakrir heilvaskaðir og minnivitandi apukattar ganga runt og skýra allar fiskimenn at vera nakrar bandittar, sum bara ríka seg upp av fólksins ogn.

Eg veit ikki, hví tað er blivið soleiðis. Kanska duga vit sjálv ov illa at siga frá veruleikanum, ella er tað tað, at onkur onnur duga ov væl at brongla veruleikan, so stórur partur av fjøldini í góðari trúgv heldur, at allir føroyskir fiskimenn liva eitt letingalív fyri stjóralønir ella fleiri ferðir tað.

Vit mugu tó sum frægast royna at lýsa viðurskiftini, sum tey eru.

**Flestu reiðarar skikka sær væl**

Tað sær betur út nú viðvíkjandi manningarviðurskiftunum í okkara fiskiflota. Árini frammanundan hava tað verið alt ov nógv dømi um óskipað viðurskifti.

Tað eru fleiri reiðarar nú, ið nú virka eftir sáttmálanum við manningarfeløgini, enn tað hevur verið. Men vit renna okkum tó enn í keðlig mál, summi so keðilig, at tey kunnu samanberast við Anitu-málið.

Alt ov ofta sleppa óskipaðu viðurskiftini at valda, tí myndugleikarnir onki gera, men bara lata hesar fáu reiðarar sleppa at hóreiggja sær, sum teimum lystir.

Tað hevði verið ynskiligt, at myndugleikarnir bara høvdu eitt sindur av vilja at halda eyga við okkara fiskiflota. Um vit ikki høvdu manningarfeløg, so hevði havið við Føroyar verið eitt satt paradís hjá teimum, ið selja bíliga arbeiðsmegi. Eitt dømi er Anitu-málið, sum bara hevði verið eitt eitt-tal í deyðsvanlukkustistikkinum og annars als ikki nakað mál, um Fiskimannafelagið ikki meldaði reiðaríið til løgregluna. Eftirlitsmyndugleikarnir sóu ikki út til sjálvbodnir at ætla at gera nakað.

Vit mugu alla tíðina vera á varðhaldi, tí annars verða fólk beinanvegin tikin handavegin at verða nýtt sum bílig arbeiðsmegi. Tey, ið vara av økinum halda tað eftir øllum at døma vera í lagið. Kanska vilja tey ikki síggja óskilið, ella halda ikki, at hesir menn eiga nøkur rættindi. Onkuntíð tykist tað, sum at okkara almenna umsiting heldur tað vera í lagið at útnytta fólk, um tey hoyra til ein ávísan samfelagsbólk.

Eitt er vist, flestu málini um óskipaða útlendska arbeiðsmegi kunnu loysast upp á lítla løtu, um vilji er til tess.

Hervið er ikki sagt, at øll í umsitingini ikki gera sítt arbeiði til lítar, tí tað gera tey. Men innan okkara øki eru tað nøkur, ið beinleiðis mótarbeiða okkum. Hetta kann ikki vera rætt, tí vit eiga at samstarva. Tey eiga heldur at vera fegin um, at vit gera vart við, at lógin verður brotin.

Tað hevði helst verið munandi betur skil á, um manningarfeløgini fingu myndugleika at gera nakað við mál, har eitt nú sáttmálar ikki vera hildnir, ella ólóglig arbeiðsmegi verður útnyttað. Hetta hevur riggað sera væl í Íslandi.

**Alt uppá land**

Tað hava verið nógvar røddir frammi um, at alt skal upp á land. Hetta er eisini ynskið hjá hjá øllum, ið starvast í fiskivinnuni. Fiskimenn hava nýtt rúma tíð upp á at fáa so nógv við til lands sum til ber.

Tíverri er tað blivið soleiðis, at øll bara sleingja um seg við hugtøkum sum burðadygd og alt í land, uttan at tey vita, hvat tey tosa um. Upprunaliga hevur tankin heslst verið góður, men nú tykist tað at vera komið inflatsjón í hesi herrópini, sum nærmast hava fingið ein religiøsan dám.

Tað er ikki viljin á sjónum, ið manglar. Tað er hinvegin á landi, at tað haltar. Gjøgnum nógv ár hava fiskimenn tikið livur. Tað er misjavnt, hvussu tað hevur eydnast. Fleiri hava verið nøgdir, men tað eru so sannuliga fleiri, ið ikki hava verið nøgdir. Hesir seinru hava knossað og stríðst við at taka livur uttan at hava fingið eina krónu burturúr, tí viðurskiftini á landi hava verið óskipað.

Onkrar trolaramanningar hava í áravís tikið innvøl. Har er sama skilið. Teir hava ikki sæð eina krónu. So spurningurin er, um tað nú er so burðardygt, at taka alt upp á land fyri síðani at beina tað burtur har. Tað er meira fyri at kitla religiøs oyru enn til frama fyri lívfrøðiligt og búskaparligt skynsemi.

Fiskimenn hava ikki nógva frítíð umborð. Teir hava ein langan arbeiðsdag og ikki somu avlopstíð, sum nógvir aðrir starvsbólkar. Tá so eyka tíð og orka skal brúkast til at hála alt møguligt til lands fyri bara at verða burturbeint, loypir ketan av.

Vit eiga at spyrja okkum sjálvi, um tað er etiskt rætt at lóggeva eyka arbeiði bara til fiskimenn, tá tað ræður til gagnnýta okkara tilfeingi.

Í øllum førum er tað okkara ófrávíkiliga krav sum fakfelag, at tað sum verður lóggivið upp á land eisini skal gagnnýtast og virðisøkjast, og fólkið umborð skal hava uppiborna samsýning fyri øktu arbeiðsbyrðuna.

**FAS**

FAS verður hálovað av nógvum, og tað er ikki lukkuligt at finnast at hesi føroysku hentleikakonstruksjónini. So eru bæði Reiðarafelagið fyri Farmaskip og Sjóvinnustýrið/FAS á gosi.

Men FAS er als ikki nøkur inntøka fyri føroyska samfelagið, men heldur ein útreiðsla, tí skipanin skaðar okkara umdømi á altjóða arbeiðsmarknaðinum so nógv, at tað hevur sín stóra prís.

Tað hevur leingi verið mín fatan, at FAS er ein opin hurð til beinleiðis útnyttan av fólki – bæði útnyttan av oftast útlendskju arbeiðsmegini og okkum føroyingum, sum í stóran mun rinda prísin fyri hesa náðileysu skipan.

FAS-lógin bleiv á sinni gjørd fyri at taka rættindi frá fólki í mun til teir sáttmálar, sum vóru frammanundan. Og FAS útmerkar seg við enn at verja arbeiðsviðurskifti, ið ikki lúka minstukrøvini í altjóða samgonguni fyri manningarfeløg ITF.

Vit eru á svartalista har. ITF hevur stemplað føroyska flaggið sum hentleikaflagg. Og tað er ikki uttan orsøk. Orsøkin er beinleiðis ódugnaskapur frá FAS-umsitingini og eitt reiðarafelag, sum heldur vil noyða manningarfeløgini at makka rætt og renna ørindi fyri reiðararnar mótvegis ITF enn at krevja av myndugleikunum, at hesir hava eftirlit við, at øll føroysk skip lúka altjóða ásetingar og treytir – herundir hava virðing fyri minstukrøvum, ið altjóða fakfelagssamgongur, sum vit eru við í, áseta.

Eg greiddi FAS-leiðsluni frá øllum hesum longu í 2009, men til fánýtis. Teir hava als ikki lurta eftir nøkrum, sum eg eri komin við, men hava meir ella minni bara sligið tað upp í glens.

Føroysku manningarfeløgini gjørdu av at stovna FMU, sum er stytting fyri Faroese Maritime Union, eftir at FAS-lóggávan varð gjørd av nýggjum fyri at kunna standa saman mótvegis avbjóðingunum.

Fiskimannafelagið átalaði beinanvegin nýggju lóggávuna og skýrdi hana at vera eitt stórt afturstig, og ein beinleiðis útnyttan av arbeiðsmegi.

Hvøssu orðini og atfinningarnar, sum eg enn haldi vera púra rættar, gjørdu, at eg sum formaður bleiv skýrdur bæði eitt og annað í fleiri teldupostum. Tí eg helt fast um, at eg ikki vildi góðtók misnýtslu av fólki.

Fiskimannafelagið heldur framvegis, at FAS er ein landskassafíggjað stuðulsskipan til reiðarar, tryggingar, bankar, advokatar, og onnur, ið so ella so eru partar av hesi skipan.

Kappingarføri verður mangan nýtt sum undanførsla fyri at gera sær dælt av bíligu arbeiðsmegini, sum mannar skipini í FAS.

Men vit fara framvegis ikki at góðkenna slíka lønardumping. Vit fara at gera alt, tað vit kunna innanfyri lógarinnar karmar fyri at steðga hesum.

Eg gjørdi fleiri ferðir vart við, at ITF ikki fór at góðkenna eina slíka skipan, sum ta hjá FAS. Tað bleiv ikki tikið til eftirtektar. Hóast áhaldandi royndir at sannføra okkara stívrenda FAS-myndugleika, gav ongin okkum gætur, og vit endaðu á svartalista hjá ITF.

Tað hevði borið til at sloppið undan hesum, um bert ein partur av tí, eg legði fram fyri okkara myndugleikar, var tikin til eftirtektar.

Eftirlønin hjá Óla
Málið um eftirlønina til fyrrverandi formann felagsins Óla Jacobsen, sum nevndin metir er játtað honum av órøttum, hevur verið drúgt og slítandi fyri felagið.

Nú hevur ein meiriluti í nevndini so gjørt av at gera eina semju við Óla Jacobsen um at rinda honum eina eingangs upphædd á 1,5 milliónir krónur alt íroknað.

Tá vit hava tikið tað burtur, ið vit sambært hansara uppáhaldi skuldu havt rindað honum higartil, svarar upphæddin til eina hálva arbeiðsmannaløn í umleið 7 ár fram í tíðina. Tá er frítíðarløn og eftirløn tikin við.

Eftirønin hjá fyrrverandi formanninum hevði lættliga komið upp í einar 5 milliónir krónur, um vit skuldu blivið við at rinda sambært avgerðini, sum táverandi nevndin tók.

Og við at gera eina semju, spara vit á leið 400.000 krónur, sum vit høvdu skula rindað í sakarmálskostnað, um vit taptu málið.

Løgfrøðingar eru sera ivasamir um útlitini, um vit gjørdu av at føra málið at enda í rættarskipanini. Váðin verður mettur so mikið stórur, at skilabest er at gera eina semju.

Fiskimenn er sum heild samdir um, at tað er ikki rætt, at fyrrverandi formaðurin bar seg soleiðis at, at hann fekk nevndina at tilluta sær sjálvum eftirløn. Limirnir sjálvir áttu onga eftirløn tá.

Kortini haldi eg, at tað er virðiligast fyri allar partar, at vit nú enda hetta málið við eini semju.

**Samtak**
Vit hava havt stóra gleði av samstarvinum í Samtak.

Tað hevur eydnast okkum í fleiri førum at steðga skipum, tí at samstarvið í Samtak hevur gjørt, at vit hava kunnu forða skipum at landa.

Uttan góða samstarvið ímillum fakfeløgini, hevði tað milt sagt verið lógloysi í økinum. Vit síggja, at ávísir leikarar ikki eru áhugaðir í at halda sáttmálar, lógir

og vanlig mannarættindi. Samtak hevur verið ein dyggur stuðul fyri okkum í Fiskimannafelagnum.

Havnar Arbeiðsmannafelag hevur tikið seg úr Samtak, og tað harmast vit um. Men felagið ætlar framvegis at samstarva tætt við hini fakfeløgini og eisini Samtak, hevur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag vissað um.

Vit síggja tí fram til eitt framhaldandi gott samstarv við Havnar Arbeiðsmannafelag.

**Samhaldsfesti**

Aftur í ár fari eg at enda mína formansfrágreiðing við staðiliga at minna á, at tað er so sera umráðandi, at fiskimenn standa saman. At vit stana saman um okkara sáttmálar, at vit gera garð um hvønn annan, tá á stendur.

Vit eiga alla tíðina at hava í huga, at tað eru kreftir, ið vilja gera alt fyri at seta kílar í fakliga samanhaldið. Tað kunnu vera fleiri orsøkir til tað. Eitt er tó vist, at onki verður vunnið við innanhýsis stríði.

Samstarv við hini fakfeløgini eigur eisini at vera útbygt. Vit hava tíbetur eitt gott samstarv við hini fakfeløgini í dag og serliga í Samtak. Slíkt kemur ikki av sær sjálvum, tí hava fakfeløgini hesi síðstu árini, roynt at betra um sínamillum samstarvið.

Sum heild vil eg siga, at hetta hevur gingið væl, men samstarv og samanhald er ein áhaldandi prosess, sum vit alla tíðina skulu halda lív í og hjúkla um – bæði sum felag og sum einstaklingar.

Við hesum fari eg at ynskja okkum øllum ein góðan landsfund.

**Ráfiskaprísir**

| | Sm. Trolarar | St. Trolarar | Línuskip |
|---|---|---|---|
| 1996 | 5,32 | 8,09 | 7,65 |
| 1997 | 5,94 | 8,61 | 8,49 |
| 1998 | 7,17 | 9,51 | 10,89 |
| 1999 | 6,86 | 9,75 | 13,25 |
| 2000 | 7,3 | 10,86 | 14,43 |
| 2001 | 6,63 | 9,76 | 15,61 |
| 2002 | 6,3 | 8,72 | 13,22 |
| 2003 | 5,01 | 10,2 | 12,66 |
| 2004 | 4,9 | 10,27 | 10,88 |
| 2005 | 4,64 | 10,17 | 12,76 |
| 2006 | 5,97 | 9,11 | 14,71 |
| 2007 | 6,05 | 9,36 | 16,44 |
| 2008 | 5,6 | 9,43 | 13,99 |
| 2009 | 5,8 | 9,35 | 9,95 |
| 2010 | 7,33 | 9,85 | 11,75 |
| 2011 | 8,48 | 7,16 | 12,56 |
| 2012 | 7,49 | 8,57 | 12,45 |
| 2013 | 5,91 | 5,89 | 10,99 |
| 2014 | 8,52 | 15,3 | 12,42 |
| 2015 | 9,65 | 18,34 | 14,08 |
| 2016 | 8,92 | 19,09 | 14,06 |

| **Hækking/lækking** | | | |
|---|---|---|---|
| 1996-2016 | 68 | 136 | 84 |
| 2013-2016 | 51 | 224 | 118 |
| 2015-2016 | -8 | -17 | 0 |

## Inntøkur fiskimanna

| Àr | Dg | Fiski part | Frt l | Dagst. | Min. l | Tils | Pr.dag kr. | Hækking/lækking í % 07/16 | 14/16 | 15/16 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Stórir ísfiskatrolarar** | | | | | | | | | | |
| 2016 | 202 | 411 | 50 | | 4 | 465 | 2232 | 23 | 11 | 9 |
| 2015 | 204 | 393 | 48 | 0 | 8 | 449 | 2052 | | | |
| 2014 | 206 | 366 | 45 | 0 | 5 | 416 | 2013 | | | |
| 2013 | 205 | 290 | 36 | 0 | 11 | 337 | 1648 | | | |
| 2012 | 225 | 362 | 44 | 0 | 5 | 411 | 1824 | | | |
| 2011 | 241 | 464 | 56 | 0 | 0 | 520 | 2157 | | | |
| 2010 | 287 | 447 | 55 | 8 | 1 | 511 | 1800 | | | |
| 2009 | 284 | 417 | 52 | 13 | 4 | 482 | 1696 | | | |
| 2008 | 188 | 304 | 37 | 4 | 3 | 345 | 1834 | | | |
| 2007 | 243 | 390 | 47 | 4 | 1 | 442 | 1816 | | | |
| **Smáir ísfiskatrolarar** | | | | | | | | | | |
| 2016 | 234 | 388 | 47 | 0 | 7 | 442 | 1856 | 12 | 14 | 0 |
| 2015 | 237 | 396 | 48 | 0 | 6 | 450 | 1848 | | | |
| 2014 | 213 | 299 | 37 | 0 | 12 | 348 | 1635 | | | |
| 2013 | 229 | 325 | 41 | 0 | 14 | 380 | 1663 | | | |
| 2012 | 234 | 362 | 45 | 0 | 11 | 418 | 1783 | | | |
| 2011 | 221 | 378 | 46 | 1 | 3 | 428 | 1938 | | | |
| 2010 | 249 | 401 | 49 | 8 | 1 | 460 | 1850 | | | |
| 2009 | 231 | 351 | 43 | 10 | 1 | 405 | 1751 | | | |
| 2008 | 219 | 317 | 39 | 8 | 1 | 365 | 1664 | | | |
| 2007 | 258 | 374 | 46 | 6 | 0 | 426 | 1655 | | | |
| **Ísfiskalínuskip** | | | | | | | | | | |
| 2016 | 237 | 260 | 36 | 0 | 38 | 334 | 1405 | -22 | 7 | 2 |
| 2015 | 230 | 265 | 34 | 0 | 22 | 321 | 1380 | | | |
| 2014 | 218 | 233 | 31 | 0 | 22 | 286 | 1308 | | | |
| 2013 | 215 | 194 | 27 | 0 | 32 | 253 | 1176 | | | |
| 2012 | 228 | 216 | 29 | 0 | 22 | 267 | 1170 | | | |
| 2011 | 232 | 218 | 29 | 8 | 19 | 273 | 1178 | | | |
| 2010 | 249 | 220 | 31 | 31 | 8 | 290 | 1164 | | | |

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2009 | 212 | 117 | 23 | 49 | 23 | 212 | 997 | | | |
| 2008 | 218 | 198 | 28 | 30 | 10 | 266 | 1220 | | | |
| 2007 | 230 | 305 | 38 | 10 | 1 | 354 | 1803 | | | |

**Inntøkur fiskimanna**

| Àr | Dg | Fiski part | Frt 1 | Dagst. | Min. 1 | Tils | Pr.dag kr. | Hækking/lækking í % 07/16 | 14/16 | 15/16 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Hekkutrolarar á flakaveiðu** | | | | | | | | | | |
| 2016 | 189 | 799 | 96 | 0 | 0 | 895 | 5000 | 80 | 23 | 11 |
| 2015 | 269 | 1092 | 131 | 0 | 1 | 1224 | 4500 | | | |
| 2014 | 233 | 843 | 101 | 0 | 2 | 946 | 4065 | | | |
| 2013 | 243 | 687 | 82 | 0 | 2 | 771 | 3848 | | | |
| 2012 | 294 | 836 | 101 | 0 | 4 | 941 | 3203 | | | |
| 2011 | 263 | 829 | 99 | 0 | 0 | 928 | 3525 | | | |
| 2010 | 298 | 917 | 110 | 0 | 0 | 1027 | 3450 | | | |
| 2009 | 231 | 438 | 53 | 1 | 0 | 491 | 2129 | | | |
| 2008 | 246 | 563 | 68 | 1 | 0 | 632 | 2574 | | | |
| 2007 | 310 | 764 | 92 | 3 | 0 | 859 | 2773 | | | |
| **Garnaskip á svartkalva- og havtaskuveiðu** | | | | | | | | | | |
| 2016 | 267 | 509 | 62 | 0 | 4 | 575 | 2205 | 22 | 45 | 12 |
| 2015 | 205 | 293 | 38 | 0 | 26 | 357 | 1963 | | | |
| 2014 | 189 | 229 | 31 | 0 | 27 | 287 | 1521 | | | |
| 2013 | 258 | 355 | 46 | 0 | 23 | 424 | 1646 | | | |
| 2012 | 108 | 169 | 20 | 0 | 7 | 196 | 1664 | | | |
| 2011 | 189 | 251 | 31 | 2 | 9 | 294 | 1557 | | | |
| 2010 | 160 | 173 | 28 | 12 | 5 | 258 | 1611 | | | |
| 2009 | 230 | 215 | 32 | 38 | 11 | 295 | 1284 | | | |
| 2008 | 212 | 230 | 30 | 17 | 4 | 281 | 1323 | | | |
| 2007 | 265 | 421 | 51 | 9 | 2 | 483 | 1812 | | | |

| Àr | Dg | Fiski part | Frt 1 | Dagst. | Min. 1 | Tils | Pr.dag kr. | Hækking/lækking í % 07/16 | 14/16 | 15/16 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ìdnaðartrolarar** | | | | | | | | | | |
| 2016 | 120 | 686 | 83 | 0 | 2 | 771 | 12900 | 331 | 167 | 75 |
| 2015 | 194 | 1075 | 129 | 0 | 0 | 1204 | 7381 | | | |
| 2014 | 146 | 618 | 75 | 0 | 10 | 703 | 4826 | | | |
| 2013 | 193 | 737 | 90 | 0 | 12 | 839 | 4349 | | | |
| 2012 | 167 | 713 | 86 | 0 | 7 | 806 | 4827 | | | |
| 2011 | 91 | 493 | 60 | 0 | 4 | 557 | 6104 | | | |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2010 | 203 | 693 | 84 | 9 | 2 | 788 | 3873 |
| 2009 | 105 | 269 | 33 | 6 | 2 | 310 | 2952 |
| 2008 | 152 | 361 | 44 | 4 | 4 | 414 | 2722 |
| 2007 | 135 | 348 | 43 | 7 | 5 | 403 | 2992 |

**Inntøkur fiskimanna**

| Àr | Dg | Fiski part | Frt l | Dagst. | Min. l | Tils | Pr.dag kr. | Hækking/lækking í % 07/16 | 14/16 | 15/16 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|

**Nótaskip**

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2016 | 189 | 1648 | 199 | 0 | 8 | 1855 | 9180 | 118 | 28 | 12 |
| 2015 | 207 | 1532 | 184 | 0 | 4 | 1720 | 8192 | | | |
| 2014 | 222 | 1417 | 171 | 0 | 8 | 1596 | 7196 | | | |
| 2013 | 207 | 1302 | 156 | 0 | 2 | 1460 | 7043 | | | |
| 2012 | 193 | 1291 | 155 | 0 | 2 | 1448 | 7489 | | | |
| 2011 | 181 | 1516 | 183 | 0 | 4 | 1703 | 9435 | | | |
| 2010 | 238 | 1362 | 162 | 6 | 8 | 1541 | 6479 | | | |
| 2009 | 177 | 726 | 89 | 7 | 7 | 828 | 4663 | | | |
| 2008 | 239 | 843 | 103 | 7 | 8 | 961 | 4021 | | | |
| 2007 | 280 | 1036 | 126 | 7 | 8 | 1177 | 4210 | | | |

**Rækjutrolarar**

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2016 | 192 | 551 | 66 | 0 | 0 | 617 | 3221 | 62 | -6 | -21 |
| 2015 | 253 | 925 | 111 | 0 | 0 | 1036 | 4095 | | | |
| 2014 | 240 | 731 | 88 | 0 | 6 | 825 | 3435 | | | |
| 2013 | 247 | 625 | 75 | 0 | 2 | 702 | 2845 | | | |
| 2012 | 323 | 836 | 100 | 0 | 0 | 936 | 2903 | | | |
| 2011 | 349 | 773 | 93 | 0 | 0 | 865 | 2479 | | | |
| 2010 | 297 | 588 | 71 | 3 | 0 | 662 | 2269 | | | |
| 2009 | 352 | 610 | 74 | 4 | 3 | 691 | 1965 | | | |
| 2008 | 367 | 654 | 79 | 1 | 0 | 733 | 1995 | | | |
| 2007 | 304 | 536 | 65 | 3 | 0 | 604 | 1989 | | | |

**Gongdin í  daginntøkuni hjá ísfiskamonnum sammett við daglønir á landi 1995-2015**

| Àr | Tíma løn | Dagløn 8 tímar | Daglønir, alt íroknað og lutfall við daglønir á landi | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | Ìsfiskalínuskip | | Stórir ísfiskatrol | | Smáir ísfiskatrol | |
| 1996 | 83,64 | 669 | 853 | 1,3 | 905 | 1,4 | 1052 | 1,6 |
| 1997 | 84,96 | 680 | 1085 | 1,6 | 966 | 1,4 | 1109 | 1,6 |
| 1998 | 85,81 | 686 | 1539 | 2,2 | 1239 | 1,8 | 1676 | 2,4 |
| 1999 | 89,79 | 718 | 1417 | 2,0 | 1200 | 1,7 | 1460 | 2,0 |
| 2000 | 93,77 | 750 | 1255 | 1,7 | 1398 | 1,9 | 1694 | 2,3 |
| 2001 | 98,52 | 788 | 1484 | 1,9 | 1584 | 2,0 | 1892 | 2,4 |
| 2002 | 103,26 | 826 | 1732 | 2,1 | 1728 | 2,1 | 1855 | 2,2 |
| 2003 | 108,08 | 865 | 1826 | 2,1 | 1652 | 1,9 | 1473 | 1,7 |
| 2004 | 112,9 | 903 | 1326 | 1,5 | 1577 | 1,7 | 1358 | 1,5 |
| 2005 | 112,9 | 903 | 1290 | 1,4 | 1824 | 2,0 | 1619 | 1,8 |
| 2006 | 112,9 | 903 | 1464 | 1,6 | 1779 | 2,0 | 1948 | 2,2 |
| 2007 | 117,07 | 937 | 1536 | 1,6 | 1815 | 1,9 | 1655 | 1,8 |
| 2008 | 119,67 | 957 | 1234 | 1,3 | 1820 | 1,9 | 1609 | 1,7 |
| 2009 | 122,38 | 979 | 997 | 1 | 1697 | 2 | 1751 | 1,8 |
| 2010 | 123,61 | 989 | 1169 | 1,2 | 1819 | 1,8 | 1878 | 1,9 |
| 2011 | 126,02 | 1008 | 1170 | 1,2 | 1820 | 1,8 | 1879 | 1,9 |
| 2012 | 127,44 | 1020 | 1171 | 1,1 | 1821 | 1,8 | 1880 | 1,8 |
| 2013 | 129,52 | 1036 | 1182 | 1,1 | 1640 | 1,6 | 1686 | 1,6 |
| 2014 | 131,98 | 1056 | 1308 | 1,2 | 2013 | 1,9 | 1635 | 1,5 |
| 2015 | 134,89 | 1079 | 1380 | 1,3 | 2052 | 1,9 | 1848 | 1,7 |
| 2016 | 137,86 | 1103 | 1405 | 1,3 | 2232 | 2,0 | 1856 | 1,7 |

Ì tímalønini er rokna frítíðarløn. Í daglønum hjá fiskimonnum eru íroknaðar allar viðbøtur. Fyri 2016 er lutvíst gjørt upp inntøkan higartil í 2016 og lutvíst tann inntøka, sum roknast kann við við verandi veiðu og prísum. Tað, sum fiskimenn fáa útyvir eina dagløn á landi (t.v.s tað, sum er útyvir 1 í tavluni), er tann viðbót, sum fiskimenn fáa fyri teirra arbeistíð útyvir 8 tímar, fyri at arbeiða allar dagar í vikuni v.m.

**Gongd í veiðu veiðusamanseting.** Vit hava síðan 1975 gjørt upp hesa gongdina.

Gongdin síðani 2000 er henda:

**Smáir trolarar**

| (Í %) | | -16 | -15 | -14 | -13 | -12 | -11 | -10 | -9 | -8 | -7 | -6 | -5 | -4 | -3 | -2 | -1 | 0 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tosk | 1 partr | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 | 1 | | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 1 | 1 | 1 | 2 |
| - | 1 lem.tr. | | | | | | | | 0 | 0 | 1 | 1 | 25 | 23 | 41 | 62 | 58 | 64 |
| Tosk | 2 partr. | 3 | 4 | 4 | 2 | 3 | 6 | 4 | 1 | 2 | 2 | 2 | 2 | 7 | 5 | 6 | 7 | 8 |
| - | 2 lem.tr. | | | | | | | | 0 | 0 | 17 | 21 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Hýsa | partr. | 1 | 1 | 1 | 1 | 0 | 1 | 1 | 2 | 2 | 3 | 2 | 2 | 4 | 6 | 6 | 5 | 8 |
| - | lem.tr. | | | | | | | | 0 | 0 | 43 | 23 | 27 | 25 | 27 | 28 | 32 | 26 |
| Upsi | partr. | 80 | 79 | 84 | 51 | 62 | 67 | 84 | 91 | 91 | 90 | 90 | 76 | 72 | 64 | 63 | 61 | 60 |
| - | lem.tr. | | | | | | | | 0 | 0 | 8 | 15 | 8 | 9 | 3 | 1 | 2 | 1 |
| Kongaf. | partr. | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 |
| - | lem.tr. | | | | | | | | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 4 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Blálon. | partr. | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| - | lem.tr. | | | | | | | | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Annað | partr. | 12 | 13 | 10 | 45 | 34 | 23 | 10 | 6 | 5 | 5 | 6 | 20 | 15 | 23 | 23 | 25 | 21 |
| - | lem.tr. | | | | | | | | 0 | 0 | 31 | 40 | 40 | 39 | 28 | 9 | 8 | 9 |
| Í alt % | partr. | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

**Stórir trolarar**

| (Í %) | | -16 | -15 | -14 | -13 | -12 | -11 | -10 | -9 | -8 | -7 | -6 | -5 | -4 | -3 | -2 | -1 | 0 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur 1 | | 1 | 9 | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 0 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 2 | 3 |
| Toskur 2 | | 4 | 1 | 14 | 1 | 1 | 2 | 3 | 2 | 10 | 8 | 6 | 21 | 19 | 18 | 4 | 6 | 14 |
| Hýsa | | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 1 | 1 | 2 | 1 | 1 | 1 | 2 | 7 | 3 | 3 |
| Blálonga | | 5 | 5 | 8 | 1 | 1 | 2 | 8 | 4 | 3 | 4 | 7 | 6 | 6 | 10 | 3 | 7 | 7 |
| Upsi | | 32 | 26 | 17 | 16 | 40 | 26 | 44 | 51 | 54 | 57 | 53 | 44 | 25 | 29 | 45 | 44 | 30 |
| Kongafiskur | | 3 | 6 | 4 | 1 | 1 | 2 | 10 | 8 | 6 | 5 | 13 | 11 | 18 | 11 | 11 | 23 | 27 |
| Svartkalvi | | 35 | 33 | 30 | 5 | 7 | 6 | 7 | 11 | 3 | 2 | 3 | 2 | 3 | 2 | 2 | 4 | 7 |
| Stinglaksur | | 10 | 11 | 11 | 2 | 2 | 3 | 7 | 6 | 6 | 3 | 3 | 2 | 5 | 8 | 5 | 2 | 1 |
| Annað | | 10 | 9 | 15 | 73 | 48 | 59 | 20 | 17 | 16 | 19 | 13 | 12 | 22 | 19 | 22 | 9 | 8 |
| Í alt % | partr. | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

**Línuskip**

| (Í %) | -16 | -15 | -14 | -13 | -12 | -11 | -10 | -9 | -8 | -7 | -6 | -5 | -4 | -3 | -2 | -1 | 0 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur 1 | 6 | 8 | 8 | 12 | 7 | 7 | 5 | 5 | 5 | 4 | 4 | 5 | 6 | 14 | 9 | 8 | 13 |
| Toskur 2 | 23 | 30 | 23 | 28 | 17 | 22 | 19 | 19 | 23 | 24 | 20 | 18 | 23 | 27 | 35 | 26 | 17 |
| Hýsa | 13 | 15 | 14 | 11 | 7 | 9 | 13 | 16 | 19 | 33 | 36 | 45 | 39 | 38 | 37 | 35 | 40 |
| Blálonga | 1 | 1 | 1 | 3 | 5 | 8 | 4 | 3 | 2 | 16 | 15 | 10 | 11 | 7 | 9 | 14 | 14 |
| Upsi | 2 | 3 | 2 | 3 | 3 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Kongafiskur | 1 | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 13 | 15 | 11 | 11 | 6 | 5 | 8 | 8 |
| Svartkalvi | 6 | 2 | 1 | 1 | 6 | 3 | 1 | 1 | 1 | 2 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Stinglaksur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Annað | 48 | 39 | 50 | 41 | 54 | 50 | 57 | 55 | 49 | 8 | 9 | 11 | 10 | 8 | 5 | 9 | 8 |

| | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Í alt % | partr. | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |